Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Løgtingið

Dagfesting: 2. mars 2021
Mál nr.: 20/02848
Málsviðgjørt: SPS
Eftirkannað: 5. februar 2021

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin), anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder (Vinnufyritøkulógin) og anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde

(Fylgibroytingar til broytingar í grannskoðaralógini og um at seta í gildi ES PIE-fyriskipan)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 73 frá 31. mai 2011 um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016, § 1 í løgtingslóg nr. 44 frá 26. apríl 2019 og § 1 í løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 93, stk. 3, verður orðað soleiðis:
"*Stk. 3.* Aðalfundur, sum Skráseting Føroya hevur kallað inn til, verður stjórnaður av persóni, sum Skrásetingin hevur heimilað til tess, og høvuðsleiðslan skal lata hesum eigarabók kapitalfelagsins, aðalfundarprotokoll og grannskoðanarprotokoll, um grannskoðarin førir eina slíka. Skráseting Føroya leggur út fyri aðalfundarkostnaðin, men endaligi kostnaðurin verður rindaður av kapitalfelagnum."

2. § 129 verður orðað soleiðis:

"**§ 129.** Limirnir í evstu leiðsluni skriva undir ta av grannskoðara gjørdu grannskoðanarprotokoll, um grannskoðarin førir eina slíka."

3. Í § 144 verður aftan á stk. 1 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 2.* Ásetingar í viðtøkum felagsins ella onnur avtala, sum avmarkar aðalfundarins val av einum ella fleiri góðkendum grannskoðarum, sum skulu grannskoða ársroknskap felagsins, umframt møguligum varafólkum fyri hesar, til ávísar av flokkar av ella lista yvir grannskoðarar, hava ikki gildi."
Stk. 2-5 verða eftir hetta stk. 3-6.

4. Í § 144, stk. 4, sum verður stk. 5, verður "stk. 2 og 3" broytt til: "stk. 3 og 4".

5. Aftan á § 144 verður sett:

"**§ 144 a.** Hóast artikkul 17, stk. 1, í Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 537/2014 frá 16. apríl 2014 om specifikke krav til lovpligtig revison af virksomheder af interesse for offentligheden, kann aðalfundurin í einum kapitalfelagi, sum er fevnt av § 1 a, nr. 3, í grannskoðaralógini, velja sama grannskoðara í mesta lagi í:

1) 20 ár, um ein útbjóðingarrunda er í samsvari við artikkul 16, stk. 2-5 í Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 537/2014 frá 16. apríl 2014 om specifikke krav til lovpligtig revison af virksomheder af interesse for offentligheden við virknaði fyri grannskoðanina eftir endan av eini gildistíð upp á 10 ár, ella
2) 24 ár, um aðalfundurin eftir eini gildistíð upp á 10 ár velur í minsta lagi ein grannskoðara aftrat at gera grannskoðanina."

6. Í § 146, stk. 3, 1. pkt., verður aftan á "á annan hátt, sbr. stk. 1" sett: "og 4".

7. Í § 146 verða sum stk. 4-6 sett:
"*Stk. 4.* Í kapitalfeløgunum, sum eru fevnd av § 1 a, nr. 3 í grannskoðaralógini, kann valdi grannskoðarin, sbr. § 144, verða settur frá við dómi, um haldgóð grund er til tað. Rættarmál um hetta kann verða reist av einum ella fleiri kapitaleigarum í kapitalfeløgum, sum tilsamans umboða í minsta lagi 5% av atkvøðurættindunum ella av felagskapitalinum umframt av Skráseting Føroya sum eftirlitsmyndugleiki við grannskoðarafyritøkum, sbr. § 30 í grannskoðaralógini.
Stk. 5. Mál um at seta felagsins grannskoðara frá eftir stk. 4 verða reist mótvegis felagnum og verða førd eftir formum samsvarandi teimum í lov om Retsplejelov for Færøerne. Fæst viðhald í einum málskravi um at grannskoðari skal setast frá, fer grannskoðarin frá, tá dómurin er endaligur. Rætturin fráboðar samstundis Skráseting Føroya og grannskoðaranum um frásetanina. Við støði í dóminum skrásetur Skrásetingin at tann frásetti grannskoðarin er farin frá.
Stk. 6. Verður grannskoðarin settur frá sambært stk. 4, verða stk. 2, 3. pkt, og stk. 3 nýtt samsvarandi."

8. § 147, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Grannskoðarin skal harumframt ansa eftir, um leiðsla felagsins heldur skyldur sínar at gera starvsskipan og til at gera og føra bøkur, yvirlit og protokollir umframt at reglurnar um at leggja fyri og undirskriva grannskoðanarprotokollina eru hildnar, um grannskoðarin førir eina slíka."

§ 2

Í anordning nr. 1114 frá 20. september 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder (Vinnufyritøkulógin), sum broytt við § 3 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, § 3 í løgtingslóg nr. 52 frá 11. mai 2009, § 2 í løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011, løgtingslóg nr. 25 frá 16. mars 2012, løgtingslóg nr. 43 frá 6. mai 2016, § 3 í løgtingslóg nr. 44 frá 26. apríl 2019 og § 2 í løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Aftan á § 11 verður sett:

"**§ 11 a.** Ásetingar í viðtøkum felagsins ella í aðrari avtalu, sum avmarka aðalfundarins val av einum ella fleiri góðkendum grannskoðarum, sum skulu grannskoða ársroknskapin í eini fyritøku, fevnd av hesi løgtingslóg,

umframt møguligum varafólkum fyri hesar, til ávísar flokkar ella listar yvir grannskoðarar ella grannskoðarafeløg, hava ikki gildi.

§ 11 b. Hóast artikkul 17, stk. 1 í Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 537/2014 frá 16. apríl 2014 om specifikke krav til lovpligtig revison af virksomheder af interesse for offentligheden, kann aðalfundurin í einum kapitalfelagi, sum er fevnt av § 1 a, nr. 3 í grannskoðaralógini velja sama grannskoðara í mesta lagi í:

1) 20 ár, um ein útbjóðingarrunda er í samsvari við artikkul 16, stk. 2-5 í Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 537/2014 frá 16. apríl 2014 om specifikke krav til lovpligtig revison af virksomheder af interesse for offentligheden, við virknaði fyri grannskoðanina eftir endan av eini gildistíð upp á 10 ár, ella
2) 24 ár, um aðafundurin eftir eini gildistíð upp á 10 ár velur í minsta lagi ein grannskoðara aftrat at gera grannskoðan."

2. Í § 19 verða sum stk. 3 og 4 sett:
"*Stk. 3.* Í eini fyritøku, sum er fevnd av § 1 a, nr. 3 í grannskoðaralógini, kann grannskoðarin verða settur frá við dómi, um haldgóð grund er til tað. Rættarmál um hetta kann verða reist av luttakarum, sum umboða 5% av atkvøðunum ella luttakarunum, umframt av Skráseting Føroya sum eftirlitsmyndugleiki við grannskoðarafyritøkum, sbr. § 30 í grannskoðaralógini.
Stk. 4. Rættarmál um at seta felagsins grannskoðara frá sambært stk. 3 verða reist mótvegis felagnum og verða førd eftir formum samsvarandi teimum í lov om Retsplejelov for Færøerne. Fæst viðhald í einum málskravi um at grannskoðari skal setast frá, fer grannskoðarin frá, tá dómurin er endaligur. Rætturin fráboðar samstundis Skráseting Føroya og grannskoðaranum um frásetanina. Við støði í dóminum skrásetur Skrásetingin, at tann frásetti grannskoðarin er farin frá."

3. § 19 e, stk. 2, verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Aðalfundurin ella líknandi fundur, ið kallað er inn til eftir stk. 1, verður stjórnaður av einum persóni, sum hevur fingið myndugleika til tess frá eftirlitsmyndugleikanum. Leiðsla fyritøkunnar skal lata eftirlitsmyndugleikanum tað tilfar, sum er neyðugt fyri, at innkalling kann fara fram í samsvari við viðtøkurnar. Aðalfundarbók og grannskoðanarprotokoll skulu harumframt útflýggjast, síðst nevnda tó bert, um grannskoðarin førir eina slíka."

§ 3

Í anordning nr. 1113 af 20. september 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde, sum broytt við § 4 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, § 4 í løgtingslóg nr. 52 frá 11. mai 2009, § 5 í løgtingslóg nr. 75 frá 25. mai 2009, § 3 í løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011 og § 3 í løgtingslóg nr. 45 frá 26. apríl 2019, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 21, stk. 6 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 6.* Førir grannskoðarin grannskoðanarprotokoll, skal grannskoðanarprotokollin leggjast fyri á nevndarfundum. Eitt og hvørt ískoyti til protokollina skal undirskrivast av øllum nevndarlimunum."

2. 29, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 3.* Grannskoðarin skal ansa eftir, um nevndin heldur skyldur sínar at gera og føra bøkur, yvirlit og protokollir umframt um reglurnar um fyrilegging og undirskriving av grannskoðanarprotokollini eru hildnar,

um grannskoðarin førir eina slika. Staðfestir grannskoðarin, at nevndu krøv ikki eru uppfylt, skal hann gera eitt serligt úttalilsi um tað, sum verður sent grunnamyndugleikanum."

3. Aftan á § 29 verður sett:

"**§ 29 a.** Hóast artikkul 17, stk. 1, í Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 537/2014 frá 16. apríl 2014 om specifikke krav til lovpligtig revison af virksomheder af interesse for offentligheden kann nevndin á fundi um ársroknskapin í einum vinnurekandi grunni, sum er fevndur av § 1 a, nr. 3, í grannskoðaralógini velja sama grannskoðara í mesta lagi í:

1) 20 ár, um ein útbjóðingarrunda er í samsvari við artikkul 16, stk. 2-5 í Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 537/2014 frá 16. apríl 2014 om specifikke krav til lovpligtig revison af virksomheder af interesse for offentligheden við virknaði fyri grannskoðanina eftir endan av eini gildistíð upp á 10 ár, ella
2) 24 ár, um aðalfundurin eftir eini gildistíð upp á 10 ár velur í minsta lagi ein grannskoðara aftrat at gera grannskoðanina."

§ 4

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2021.
Stk. 2. § 1, nr. 3, og § 2, nr. 1, verða nýttar frá dagsetingini av fyrsta valinum av einum ella fleiri grannskoðarum til at grannskoða ársroknskapin eftir gildiskomu løgtingslógarinnar. Avtalur um avmarkingar í valinum av einum ella fleiri góðkendum grannskoðarum, sum skulu grannskoða ársroknskapin, og møguligum varafólkum fyri hesar, til ávísar flokkar ella listar yvir grannskoðarar ella grannskoðarafeløg, varðveita teirra gildi til dagsetingina av fyrsta valinum av einum ella fleiri grannskoðarum.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Við uppskotinum um broyting í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir (grannskoðaralógin) verður skotið upp at dagføra føroysku grannskoðaralógina, so hon verður í samsvari við ES-direktiv 2014/56/EU frá 16. apríl 2014, sum broyting av ES-direktivi 2006/43/EF frá 17. mai 2006 um lógarálagda grannskoðan av ársroknskapum og konsoliderøðum roknskapum (8. vinnufelagsdirektivið).

Eisini verður grannskoðaralógin tillagað soleiðis, at hon er í samsvari við Europa-Parlamentets og Rådets forordning (EU) nr. 537/2014 af 16. april 2014 om specifikke krav til lovpligtig revison af virksomheder af interesse for offentligheden (hereftir PIE-fyriskipanin).

Harumframt verður skotið upp at seta PIE-fyriskipanina í gildi í Føroyum við serligari løgtingslóg, sum er galdandi fyri fyritøkur av almennum áhuga (PIE- fyritøkur). PIE-fyritøkur eru eftir uppskotinum til broyting í grannskoðaralógini børskrásettar fyritøkur, peningastovnar og tryggingarfeløg.

Skotið verður upp, at nakrar av teimum reglum, sum ætlanin er at seta í gildi, verða ásettar í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (vinnufelagalógin), anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder (vinnufyritøkulógin) og í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om erhvervsdrivende fonde (hereftir vinnugrunnalógin). Tað snýr seg m.a. um val og uppsøgn av grannskoðara.

1.2. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at tryggja, at føroysk lóggáva á grannskoðaraøkinum er á støði við lóggávuna í londum, sum vit vanliga samanbera okkum við og í samsvari við ES-reglur.

1.3. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

1.3.1. Valskeið grannskoðarans

1.3.1.1. Galdandi reglur

Eftir vinnufelagalóggávuni verður grannskoðarin valdur á aðalfundinum fyri eitt ávíst tíðarskeið ella uttan tíðaravmarking. Grannskoðarin er í starvi, til nýggjur hevur tikið við, uttan so at annað fylgir av lóggávuni ella av viðtøkunum hjá fyritøkuni ella annað er avtalað. Vinnufyritøkulógin og vinnugrunnalógin hava ikki nærri sakligar reglur um valskeið grannskoðarans.

Tað framgongur av grannskoðaralógini, at eitt grannskoðanarvirki, ið grannskoðar PIE-fyritøkur, skal tryggja, at tann ella teir grannskoðarar, ið undirskriva grannskoðanarátekningina, í seinasta lagi 7 ár eftir, at teir eru tilnevndir at gera uppgávuna, verða skiftir út fyri eitt tíðarskeið, sum er í minsta lagi 2 ár. Grannskoðanaruppgávan kann tó verða latin einum øðrum grannskoðara í somu grannskoðanarfyritøku.

1.3.1.2. Uppskot

Eftir PIE- fyriskipanini skal grannskoðari av PIE- fyritøkum verða valdur fyri eitt tíðarskeið upp á í minsta lagi eitt ár, og samlaða valtíðarskeiðið skal ikki vera longri enn 10 ár. Bakstøðið fyri avmarkingunum viðvíkjandi valskeiði grannskoðarans er at styrkja grannskoðarans óheftni og økja kappingina á grannskoðaramarknaðinum.

Eftir PIE- fyriskipanini er tó møguligt at leingja valskeiðið soleiðis, at ein fyritøka kann leingja valskeiðið í mesta lagi til 20 ár, um tað verður framd ein útbjóðingarmannagongd viðvíkjandi lógarálagdari grannskoðan, ella 24 ár, um meira enn ein grannskoðari ella meira enn ein grannskoðarafyritøka eftir endan á mest loyvda skeiðinum upp á 10 ár samstundis ger eina grannskoðarauppgávu.

Eftir lógaruppskotinum er møguligt at nýta báðar møguleikarnar at leingja valskeið grannskoðarans.

Møguleikin at leingja mesta loyvda valskeiðið við at velja ein grannskoðara aftrat kann hava við sær, at smærri grannskoðarafyritøkur í størri mun kunnu koma upp tal sum 2. grannskoðari. Tað kann sum frá líður viðvirka til, at fleiri grannskoðarafyritøkur kunnu grannskoða PIE- fyritøkur, og við tí kann tað tarna marknaðarkonsentratión.

Ásetingin verður sett inn í vinnufelagalógina. Sostatt verður ásetingin eisini nýtt upp á fíggjarligar fyritøkur við tað, at fíggjarliga lóggávan vísir til vinnufelagalógina. Harumframt verður ásetingin sett inn í vinnufyritøkulógina og vinnugrunnalógina.

1.3.2. Forboð fyri avtalum um avmarkingar í vali av grannskoðara.

1.3.2.1. Galdandi reglur

Ársroknskaparlógin fyriskipar, hvørt ein fyritøka er undir grannskoðanarskyldu. Hvussu grannsskoðarin verður tilnevndur verður fyrikipað í viðkomandi serlógum - vinnufelagalógini, vinnufyritøkulógini og vinnugrunnalógini.

Í kapitalfeløgum er tað sum meginregla aðalfundurin, sum velur grannskoðara við vannligum meiriluta. Í byrjanarstøðu kann ein og hvør góðkendur grannskoðari tilnevnast. Vinnufelagalógin tekur ikki støðu til spurningin um, hvørt skarin av grannskoðarum, sum kann veljast, kann minka.

Vinnufyritøkulógin skipar hvørki, hvussu grannskoðari verður tilnevndur ella, hvørt skarin av grannskoðarum, sum kunnu veljast, kann smalkast. Lógin skipar heilt yvirskipaðar meginreglur fyri virksemið hjá grannskoðaranum, undir hesum skylduna hjá leiðsluni at lata grannskoðaranum upplýsingar.

Í vinnurekandi grunnum skulu ein ella fleiri grannskoðarar grannskoða ársroknskapin, tilnevndir av nevndini ella sambært viðtøkunum.

1.3.2.2. Uppskot

Eftir nýggju ES- reglunum er forboð fyri “avmarkingum av valmøguleikum fyri aðalfundin av partaeigarum ella limir í tí grannskoðaðu fyritøkuni” í sambandi við tilnevning av grannskoðara. Verandi avmarkingar verða ógildar, tá reglurnar koma í gildi. Nýggja forboðið snýr seg einans um val av grannskoðara fyri at útinna lógarálagda grannskoðan- ikki val av grannskoðara fyri at gera aðarar uppgávur.

Forboðið verður ásett í føroyska lóggávu í viðkomandi serlóggávu. Í vinnufelagalógini verður skotið upp, at til vanligu reglurnar um val av grannskoðara verður gjørt ískoyti við forboði fyri avnmarking av vali av grannskoðara í felagsins viðtøkum ella í aðrari avtalu. Í vinnufyritøkulógini verður skotið upp at seta ítøkiligt forboð fyri avmarking av vali av grannskoðara í felagsins viðtøkum ella í aðrari avtalu.

Samsvarandi forboð verður ikki sett í vinnugrunnalógina við tað, at ein grunnur er sjálveigandi, og at tað ikki – sum í kapitalfeløgum og vinnurekandi fyritøkum – er ein eigaraskari, hvørs valmøguleikar skulu verjast.

Við tað at ein avmarking av vali av grannsskoðara fyrst fær týdning, tá grannskoðari skal veljast, verður skotið upp, at nýggju ásetingarnar fyrst fáa gildi í sambandi við fyrst komandi val av grannskoðara aftan á, at lógin er komin í gildi. Til ta løtu varðveita møguligar verandi avtalur um avmarkingar av valinum teirra gildi.

1.3.3. Uppsøgn grannskoðarans, minnilutaverja

1.3.3.1. galdandi reglur
Fyri tey ymsu sløgini av fyritøkum ganga reglurnar um val av og uppsøgn av grannskoðara fram av viðkomandi lógum - vinnufelagalógini, vinnufyritøkulógini og vinnugrunnalógini. Alment er galdandi, at grannskoðari kann verða sagdur upp av tí, sum hevur valt hann.

1.3.3.2. Uppskot
Nýggju ES- reglurnar innihalda nýggj krøv, har partaeigararnir, sum hava í minsta lagi 5 % av atkvøðurættinum ella atkvøðurættinum í eini PIE- fyritøku, og eftirlitsmyndugleikin skulu hava møguleika at leggja rættarsak um uppsøgn av grannskoðara, um tað er ein haldgóð grund til tað.

Skotið verður upp, at í vinnufelagalógini og vinnufyritøkulógini verða settar ásetingar um, at grannskoðari í PIE- fyritøkum kann verða sagdur úr starvi við dómi, um tað er haldgóð grund til tað. Rættarmál kann verða reist av einum ella fleiri kapitaleigarum í kapitalfeløgum, sum tilsamans umboða í minsta lagi 5% av atkvøðurættindunum ella av felagskapitalinum umframt av Skráseting Føroya sum eftirlitsmyndugleiki við grannskoðarafyritøkum, sbr. § 30 í grannskoðaralógini.

1.4. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotini vórðu send til hoyringar hjá hesum pørtum: Felagið Føroyskir Grannskoðarar, Vinnuhúsið, Felagið Peningastovnar, Grannskoðaraeftirlitið, Tryggingareftirlitið og Fíggjarmálaráðið. Uppskotið hevur eisini ligið frammi á heimasíðu Umhvørvis- og vinnumálaráðsins.

Uppskotið var til hoyringar samstundis sum uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir og uppskot til løgtingslóg um at seta í PIE- fyriskipanina í gildi.

Hesi sendu inn viðmerkingar til uppskotini:

- Felagið Føroyskir Grannskoðarar
- Januar, løggilt grannskoðanarvirki

- Numo, løggilt grannskoðanarvirki
- Spekt, løggilt grannskoðanarvirki
- Grannskoðaraeftirlitið
- Tryggingareftirlitið
- Eftirlønargrunnur FA's

Føroya Arbeiðsgevarafelag, Betri Trygging og Betri Pensjón boðaðu frá, at feløgini ongar viðmerkingar høvdu til uppskotini.

Innkomnu viðmerkingarnar snúðu seg um øll trý uppskotini, og uppskotini verða latin Løgtinginum til viðgerðar samstundis. Viðmerkingarnar og hoyringarnotat frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum um innkomnu viðmerkingarnar eru løgd við sum fylgiskjøl til hetta uppskotið og til hini bæði uppskotini.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Møguleikin at leingja mesta loyvda valskeiðið við at velja ein grannskoðara aftrat kann hava við sær, at smærri grannskoðarafyritøkur í størri mun kunnu koma upp tal sum 2. grannskoðari. Tað kann eftirhondini viðvirka til, at fleiri grannskoðarafyritøkur kunnu grannskoða PIE- fyritøkur, og við tí kann tað mótvirka marknaðarkonsentratión.

Striking av skylduni at føra granskoðaraprotokoll kann hava fíggjarligar og umstingarligar lættar við sær fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið tekur støði í 8. vinnufelagsdirektivinum og PIE-fyriskipanini.

Í samsvari við direktivið og fyriskipanina eru møguleikarnir nýttir at seta slakari krøv enn ásett í direktivinum og fyriskipanini.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Tað eru ikki tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, sum eru eru viðkomandi fyri lógaruppskotið.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Valdi grannskoðarin kann verða settur frá við dómi, um haldgóð grund er til tað. Rættarmál um hetta kann verða reist av einum ella fleiri kapitaleigarum í kapitalfeløgum, sum tilsamans umboða í minsta lagi 5 % av atkvøðurættindunum ella av felagskapitalinum umframt av Skráseting Føroya sum eftirlitsmyndugleiki við grannskoðarafyritøkum.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur grannskoðara at lata grunnamyndugleikanum upplýsingar fyri at grunnamyndugleikin skal kunna røkja sínar eftirlitsskyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Skráseting Føroya kann, um haldgóð grund er fyri tí, sum eftirlitsmyndugleiki við grannskoðarafyritøkum reisa rættarmál um at seta grannskoðarar frá starvinum.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lóggaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Ja

Sosialar avleiðingar		Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1

Til nr. 1
Leiðsla kapitalfelagsins hevur skyldu til at gera allar neyðugar upplýsingar tøkar fyri grannskoðara, sum skal lata váttan um viðurskifti kapitalfelagsins, og evsta leiðsla felagsins skal gera eigarabók, aðalfundarprotokoll og grannskoðanarprotokoll tøka, sbr. stk. 3 í uppskotinum.

Talan er um framhald av galdandi § 93, stk. 3, tó við rættingum sum avleiðing av § 1, nr. 31 í uppskotinum til løgtingslóg um broyting í grannskoðaralógini, sum verður lagt fyri Løgtingið samstundis sum hetta uppskotið. Í § 1, nr. 32 í tí uppskotinum verður skotið upp at strika kravið í § 18 grannskoðaralógini um at grannskoðarin skal føra eina grannskoðanarprotokoll. Lógarálagda kravið verður frameftir ásett í PIE-fyriskipanini galdandi fyri PIE-fyritøkur.

Orsakað av hesum verður skotið upp, at gera eina fylgibroyting í § 93, stk. 3, har tað gongur fram, at høvuðsleiðslan skal útflýggja felagsins grannskoðanarprotokoll, um grannskoðarin hevur ført eina slíka. Kravið um at at útflýggja felagsins grannskoðanarprotokoll er galdandi uttan mun til, um tað er áliggur grannskoðaranum at føra eina slíka, ella um grannskoðarin annars eftir avtalu við kapitalfelagið hevur ført eina grannskoðanarprotokoll.

Til nr. 2
§ 129 í galdandi lóg ásetur, at limirnir í evstu leiðsluni skulu skriva undir tað av grannskoðaranum gjørdu grannskoðanarprotokoll, um tað eftir grannskoðaralógini ella aðrari lóggávu er álagt grannskoðaranum at føra eina slíka, ella um grannskoðarin annars eftir avtalu við kapitalfelagið hevur ført grannskoðanarprotokoll.

Ásetingin í § 129 verður eftir uppskotinum orðað av nýggjum, sum fylgja av § 1, nr. 31, í uppskotinum til løgtingslóg um broyting í grannskoðaralógini, har lógarálagda kravið í grannskoðaralógini um, at grannskoðarin skal føra eina grannskoðanarprotokoll, verður strikað fyri onnur feløg enn PIE - fyritøkur. Fyri PIE- fyritøkur fer kravið at ganga fram av PIE- fyriskipanini.

Um grannskoðari hevur ført eina grannskoðanaprotokoll, er tað framvegis krav um, at limirnir í evstu leiðsluni skulu undirskriva ta av grannskoðarunum gjørdu grannskoðanarprotokoll uttan mun til, um tað áliggur grannskoðaranum at føra eina slíka, ella um grannskoðarin annars eftir avtalu við kapitalfelagið hevur ført eina grannskoðanarprotokoll, sbr. § 1, nr. 1 í uppskotinum

Ásetingin verður nýtt upp á nevndina, um tað er ein slík, umframt samsvarandi upp á fundir í eftirlitsráðnum. Í smápartafeløgum, har tað bert er ein stjórn, sbr. § 111, stk. 1, nr. 2 í vinnufelagalógini, verður ásetingin samsvarandi galdandi reglum nýtt uppá stjórn felagsins, um tað eru fleiri limir.

Um grannskoðarin førir eina grannskoðanarprotokoll, skulu allir limir í nevndini ella í eftirlitsráðnum undirskriva grannskoðanarprotokollina. Limir, sum ikki eru møttir, undirskriva protokollina seinni.

Til nr. 3
Í føroyskum rætti verður tilnevning av grannskoðara fyriskipað í viðkomandi serlógum treytað av slag av fyritøku. Tilnevning av grannskoðara í kapitalfeløgum verður sostatt fyriskipað í § 144 í vinnufelagalógini.

Artikkul 37 í 8. vinnufelagadirektivinum fyriskipar tilnevningina av grannskoðarum og grannskoðarafeløgum. Í byrjanarstøðu er tað aðalfundurin, sum tilnevnir grannskoðarar (stk. 1), men aðrar mannagongir fyri tilnevningina eru loyvdar um so er, at grannskoðarans óheftni av grannskoðaðu fyritøkuni er tryggjað (stk. 2).

Við broytingardirektivinum er skoytt eitt nýtt stk. 3 upp í artikkul 37, hareftir ein og hvør áseting í avtalu, sum avmarkar valmøguleikarnar fyri tilnevning av grannskoðara ella grannskoðarafyritøku, sum skal útinna lógarálagda grannskoðan av hesi fyritøku, er forboðin. Javnsett við ásetinga í artikkul 37, stk. 3, er fyri PIE-fyritøkur ásett eitt forboð í artikkul 16 í PIE-fyriskipanini.

Fyri føroysk feløg ásetur uppskotið til § 144, stk. 2, samsvarandi reglur um forboð fyri at avmarka aðalfundarins val av grannskoðara, sum eru ásettar í artikkul 37, stk. 3 í 8. vinnufelagadirektivinum.

Forboðið í broytingardirektivinum og í PIE- fyriskipanini fevnir, sum tað er orðað, um eina og hvørja áseting í avtalu, sum avmarkar valmøguleikarnar í sambandi við tilnevning av grannskoðara. Í uppskotinum er orðingin "ásetingar í viðtøkum felagsins ella onnur avtala" fyri at gera greitt, at bæði viðtøkur og onnur sløg av avtalum, undir hesum eigaraavtalur, eru fevndar av forboðnum.

Til nr. 4
Talan er um eina konsekvensrætting sum fylgja av § 1, nr. 1 í uppskotinum.

Til nr. 5
Eftir artikkul 17, stk. 1, í PIE- fyriskipanini skal grannskoðari av PIE- fyritøkum verða valdur fyri eitt tíðarskeið upp á í minsta lagi eitt ár, og samlaða valtíðarskeiðið skal ikki verða longri enn 10 ár.

Eftir PIE- fyriskipanini er tó møguligt at leingja valskeiðið upp til 20 ella 24 ár, um grannskoðarauppgávan hevur verið í útboði, ella um tað verða valdir meira enn ein grannskoðari.

Eftir lógaruppskotinum er møguligt at nýta báðar møguleikarnar at leingja valskeið grannskoðarans.

Eftir § 144 a, nr. 1 í uppskotinum verður loyvt samsvarandi við artikkul 17, stk. 4, litra a, í fyriskipanini, at sami grannskoðari kan halda fram upp til 20 ár, um ein útbjóðingarmannagongd er framd samsvarandi artikkul 16, stk. 2-5 í PIE- fyriskipanini, við virknaði fyri grannskoðanina eftir endan á 10-ára tíðarskeiðinum.

Eftir § 144 a, nr. 2 í uppskotinum verður loyvt samsvarandi við artikkul 17, stk. 4, litra b, í fyriskipanini, at sami grannskoðari kann halda fram at grannskoða upp til 24 ár, um tað við

virknaði fyri grannskoðanina eftir endan á 10- ára tíðarskeiðinum verður valdur í minsta lagi ein grannkoaðri aftrat.

Leingjan sambært 144 a, nr. 1 ella 2, treytar, at nevndin í fyritøkuni ella eftirlitsráðið eftir tilmæli frá stjórn felagsins hevur skotið upp fyri aðalfundinum ella samsvarandi avgerðarstovni at leingja upgávuna, og at uppskot um tað verður samtykt.

Ásetingin er bert galdandi fyri kapitalfeløg, sum eftir grannskoðaralógini eru allýst sum PIE-fyritøkur, sbr. § 1, nr. 5 (nýggj § 1 a, stk. 1, nr. 3), í uppskotinum til løgtingslóg um broyting í grannskoðaralógini.

Til nr. 6
Í § 146 í vinnufelagalógini eru ásettar reglur um val og uppsøgn av grannskoðara.

Ískoytið, sum skotið er upp í stk. 3, er ein avleiðing av uppskotinum um eitt nýtt stk. 4, sbr. broyting nr. 7.

Til nr. 7
Við uppskotinum verða sett nýggj stk. 4-6 í § 146. Broytingin er avleiðing av broytingardirektivinum, sum setur eitt nýtt stk. 3 í artikkul 38 um uppsøgn av grannskoðara.

Galdandi reglur um uppsøgn av grannskoðara eru í vinnufelagalógini, meðan innihaldið annars í 8. vinnufelagadirektivinum er í grannskoðaralógini.

Artikkul 38, stk. 3, í direktivinum fevnir bert um PIE- fyritøkur, sbr. § 1 a, stk. 1, nr. 3, í uppskotinum til løgtingslóg um broyting í grannskoðaralógini.

Í stk. 4, 1. pkt., í uppskotinum er ásett, at grannskoðari í einum kapitalfelagi, sum er PIE-fyritøka, kann verða settur frá við domi, um haldgóðar grundir eru til tað.

Haldgóðar grundir kunnu broytast sum frá líður. Haldgóðar grundir kunnu vera, at grannskoðari ikki hevur hildið reglurnar um góðan grannskoðanarsið. Góður grannskoðanarsiður er t.d., at grannskoðarin skal vísa integritet, partloysi, trúnað, yrkisliga framferð, yrkisførleika og neyðugt nærlagni, tá uppgávurnar verða framdar. Ein haldgóð grund kann vera, at grannskoðari hevur havt slíka atferð, at tað er orsøk at halda, at viðkomandi ikki longur kann røkja ítøkiligu uppgávuna á fullgóðan hátt. Tað kann eisini vera føri, har grannskoðarin ikki hevur verið nóg hyggin at halda § 22 í grannskoðaralógini um óheftni. Harumframt kann tað í førum, har viðkomandi grannskoðari má haldast at vera greitt óskikkaður, at rættarmál verður reist um uppsøgn av grannskoðara.

Tey føri, har tað kann koma upp á tal at nýta ásetingina, líkjast sostatt teimum førum, har tað kann vera grundarlag fyri at taka gókenningina frá grannskoðaranum eftir § 42, stk. 2, í grannskoðaralógini.

Tað gongur fram av artikkul 38, stk. 3 í broytingardirektivinum, at eitt mál við dómstólarnar um uppsøgn av grannskoðara, kann verða reist av:

1) Kapitaleigarum, sum eiga í minsta lagi 5 % av atkvøðurættinum ella kapitalinum,
2) øðrum stovnum í grannkoðaðu fyritøkuni, tá tað er ásett í nationalari lóggávu, ella
3) málsførum myndugleikum, sbr. artikkul 32 í direktivinum.

Tað fylgir av vinnufelagalógini, at í byrjanarstøðu er tað tann, sum velur grannskoðara, sum kann siga grannskoðara upp, um tað eru haldgóðar grundir. Uppskotið broytir verandi møguleikar at uppsiga grannskoðara við tað, at eftir uppskotinum kann grannskoðari sigast upp við dómi.

Eftir stk. 4. 2. pkt., í uppskotinum kunnu kapitaleigar, sum tilsamans umboða í minsta lagi 5 % av atkvøðurættindunum ella av felagskapitalinum umframt Skráseting Føroya sum eftirlitsmyndugleiki við grannskoðarafyritøkum reisa rættarmál um uppsøgn av grannskoðara.

Eftir stk. 5 í uppskotinum verða rættarmál reist mótvegis felagnum og verða førd eftir reglunum í rættargangslógini um borgarlig rættarmál. Grannskoðarin má haldast at kunna leggja upp í (intervenera) slík mál eftir reglunum um tað í rættargangslógini.

Tað er ikki ásett nøkur fyrningarfreist fyri at reisa rættarmál, men vanligar reglur um passivitet kunnu hava við sær, at man missur rættin at reisa rættarmál.

Valdi grannskoðarin kann halda fram sum grannskoðari undir rættarmálinum. Er niðurstøðan í einum dómi, at grannskoðarin verður sagdur upp, fer grannskoðarin frá, tá dómurin er endaligur, t.v.s tá kærufreistin er farin, uttan at dómurin er kærdur. Rætturin fráboðar samstundis Skráseting Føroya og grannskoðaranum um uppsøgnina. Skráseting Føroya skrásetur, at grannskoðarin er farin frá sum grannskoðari hjá felagnum.

Tilvísingin í stk. 6 í uppskotinum til stk. 2, 3. pkt. hevur við sær, at grannskoðari í einum børsskrásettum felagi eftir reglunum í virðisbrævahandilslógini skjótast gjørligt skal boða børsinum frá, at hann er farin frá.

Tilvísingin í stk. 6 í uppskotinum til stk. 3 hevur við sær, at høvuðsleiðsla felagsins skjótast gjørsligt skal skipa fyri vali av nýggjum grannskoðara og innkalla til eykaaðalfund um tað. Í børsskrásettum feløgum skal innkallast í seinasta lagi 8 dager eftir, at felagið hevur fingið fráboðan um uppsøgn av grannskoðaranum.

Til nr. 8

Eftir galdandi § 147, stk. 2, skal grannskoðarin ansa eftir, at felagið heldur skyldur sínar at gera starvsskipan og til at gera og føra bøkur, yvirlit og gerðabøkur, og at reglurnar um at leggja fyri og undirskriva grannskoðanarprotokollina eru hildnar.

Ásetingin í § 147, stk. 2, er orðað av nýggjum sum fylgja av, at eftir § 1, nr. 31 í uppskotinum til løgtingslóg um broyting av grannskoaðralógini verður tað ikki longur eitt lógarásett krav, at onnur grannskoðanarvirkir enn PIE- fyritøkur skulu føra eina grannskoðanarprotokoll.

Um so er, at grannskoðari hevur ført eina grannskoðanarprotokoll, er tað framvegis krav um, at limirnir í evstu leiðsluni skulu undirskriva ta av grannskoðaranum gjørdu grannskoðanarprotokoll uttan mun til, um tað áliggur grannskoðaranum at føra eina slíka, ella um grannskoðarin annars eftir avtalu við kapitalfelagið hevur ført eina grannskoðanarprotokoll. Víst verður annars til viðmerkingarnar til § 1, nr. 2, í uppskotinum

Til § 2

Til nr. 1
Galdandi lóg um vinnurekandi fyritøkur inniheldur ongar fyriskipanir um val av granskoðara og longd á grannskoðanaruppgávu grannskoðarans. Viðvíkjandi virksemi grannskoðarans í eini vinnurekandi fyritøku fyriskipar lógin bert hesi viðurskiftini: Fráboðan og broyting av grannskoðara (§11), skylda leiðslunnar at lata grannskoðaranum upplýsingar (§ 18), uppsøgn av grannskoðara í úrtíð (§ 19, stk. 1) og skylda grannskoðarans at fráboða Skráseting Føroya um uppsøgn (§ 19, stk. 2)

Við broyting í 8. vinnufelagadirektivinum er í direktivið sett inn nýggjur artikkul 37, stk. 3, sum inniheldur forboð fyri avmarkingum í aðalfundarins vali av grannskoðara.

Harumframt inniheldur artikkul 17, stk. 1, í PIE- fyriskipanini ásetingar um longdina av grannskoðarans grannskoðanaruppgávu í eini PIE- fyritøku. Har er ásett, at longdin á tíðarskeiðinum ikki kann fara upp um eitt tíðarskeið upp á 10 ár í mesta lagi. Eftir fyriskipaninnar artikkul 17, stk. 4, er tó møguligt nationalt at loyva upp til 20 ár, um grannskoðanaruppgávan hevur verið í útboði, og upp til 24 ár, um meira enn ein grannskoðari verður valdur.

Skotið verður tí upp, at í vinnufyritøkulógina verður sett inn ein nýggj § 11 a, sum ásetur forboð samsvarandi § 37, stk. 3, í 8. vinnufelagadirektivinum og nýggj § 11 b viðvíkjandi longdini á grannskoðanini samsvarandi artikkul 17, stk. 4, í PIE- fyriskipanini.

Í § 11 a, verður skotið upp at áseta forboð fyri í felagsins viðtøkum ella avtalum (svarandi til ta í direktivinum nýttu orðing: avtaluásetingar), sum avmarka valmøguleikarnar í sambandi við valið av grannskoðara til ávísar flokkar ella listar yvir grannskoðarar ella grannskoðanarfeløg. Um viðtøkurnar hjá eini fyritøku ella onnur avtala inniheldur ásetingar, sum avmarka valmøguleikarnar í sambandi við valið av grannskoðara til ávísar flokkar ella listar yvir grannskoðarar ella grannskoðanarfeløg, hava hesar ásetingar eftir uppskotinum ikki gildi. Eitt lyfti, sum ikki hevur gildi, hevur ikki rættarvirknað eftir sínum innihaldi. Avtaluparturin hevur sostatt hvørki krav upp á, at valt verður innanfyri avmarkaða skaran av grannskoðarum ella endurgjald. Ásetingarnar annars í viðtøkunum ella avtaluni verða ikki ávirkaðar av, at ásetingarnar um avmarkingar ikki hava gildi.

Víst verður annars til viðmerkingarnar til § 1, nr. 3.

Í § 11 b verður skotið upp at nýta møguleikarnar í PIE- fyriskipanini at leingja valskeiðið við sama grannskoðara soleiðis, at ein PIE- fyritøka, kann leingja tíðarskeiðið við 10 árum aftrat, um grannskoðanruppgávan hevur verið í útboði eftir artikkul 16, stk. 2-5 í fyriskipanini, og upp til 14 ár, um meira enn ein grannskoðari verður valdur.

Víst verður til viðmerkingarnar til § 1, nr. 5 í lógaruppskotinum.

Til nr. 2
Um bakstøðið fyri uppskotinum verður víst til § 1, nr. 6 og 7 um broyting av § 146.

Til nr. 3
Eftir § 19 e, stk. 1 í galdandi vinnufyritøkulóg kann eftirlitsmyndugleikin í serligum førum kalla inn til aðalfund ella annan fund, ið er evsti myndugleiki hjá fyritøkuni. Ásetingin í § 19, e, stk. 2 í galdandi lóg snýr seg um skyldu grannskoðarans at útflýggja tað tilfar, sum er

neyðugt fyri, at eftirlitsmyndugleikin kann innkalla til aðalfundin samsvarandi viðtøkum felagsins.

Ásetingin í § 19 e, stk 2, verður orðað av nýggjum sum fylgja av § 1, nr. 31 í uppskotinum til løgtingslóg um broyting í grannskoðaralógini, har lógarálagda kravið í grannskoðaralógini um, at grannskoðarin skal føra eina grannskoðanarprotokoll, verður strikað fyri onnur feløg enn PIE - fyritøkur.

Kravið um at útflýggja grannskoðanarprotokollina er framvegis galdandi uttan mun til, um tað áliggur grannskoðaranum at føra ein slíka, ella um grannskoðarin annars eftir avtalu við leiðsluna hevur ført eina slíka.

Til § 3

Til nr. 1
Ásetingin í § 21, stk. 6, í galdandi vinnugrunnalóg snýr seg um, at grannskoðanarprotokollin skal leggjast fyri á hvørjum nevndarfundi.

Ásetingin í stk. 6 verður orðað av nýggjum sum fylgja av, at í uppskotinum til § 1, nr. 31 í uppskotinum til løgtingslóg um broyting í grannskoðaralógini, verður lógarálagda kravið í grannskoðaralógini um, at grannskoðarin skal føra eina grannskoðanarprotokoll, strikað fyri onnur feløg enn PIE-fyritøkur.

Um so er, at grannskoðarin førir eina grannskoðanarprotokoll, er tað framvegis krav um, at nevndin skal undirskriva ta av grannskoðaranum gjørdu grannskoðanarprotokoll uttan mun til, um tað áliggur grannskoðaranum at føra eina slíka, ella um grannskoðarin annars eftir avtalu við nevndina hevur ført eina grannskoðanarprotokoll.
Í førum tá tað verður ført ein grannskoðanarprotokoll, skulu nevndarlimir, sum eru til staðar, undirskriva protokollina. Nevndarlimir, sum ikki eru til steðar, undirskriva seinni.

Til nr. 2
Ásetingin í § 29, stk. 3 í galdandi vinnugrunnalóg nevnir tey viðurskifti, sum grannskoðarin skal ansa eftir viðvíkjandi skyldum nevndarinnar at gera og føra bøkur, yvirlit og protokollir o.a.

Ásetingin í stk. 3 verður orðað av nýggjum sum fylgja av, at í uppskotinum til § 1, nr. 31 í uppskotinum til løgtingslóg um broyting í grannskoðaralógini, verður lógarálagda kravið í grannskoðaralógini um at grannskoðarin skal føra eina grannskoðanarotokoll, strikað fyri onnur feløg enn PIE-fyritøkur.

Um so er, at grannskoðarin førir eina grannskoðanarprotokoll, er tað framvegis krav um, at nevndin skal undirskriva ta av grannskoðaranum gjørdu grannskoðanarprotokoll, uttan mun til, um tað áliggur grannskoðaranum at føra eina slíka, ella um grannskoðarin annars eftir avtalu við nevndina hevur ført eina grannskoðanarprotokoll.

Skyldur nevndarinnar eru m.a. at sambært § 21, stk. 4, í galdandi lóg skal gerast og førast ein gerðabók fyri nevndina, sum skal undirskrivast av øllum nevndarlimum, sum eru til staðar.

Grannskoðarans skyldur hava m.a. við sær, at nevndu skjøl eru gjørd og nøktandi dagførd. Grannskoðarin skal ikki gera eina innihaldsliga eftirkanning av skjølunum.

Eftir § 34, stk. 2 í galdandi vinnugrunnalóg, kann grannskoðarin í sini átekning fráboða upplýsingar, sum grannskoðarin heldur, at tað er rættast, at Skrásetingin Føroya, sum skrásetigarmyndugleiki og sum grunnamyndugleiki fær kunnleika um. Ásetingin í § 34, stk. 2, viðvíkur fráboðanum til grunnamyndugleikan um brot á grunnalóggávuna ella viðtøkurnar, sum ikki eru av minni týdningi, meðan skyldan eftir § 29, stk. 3, í uppskotinum snýr seg um tey meira formligu krøvini, sum nevndin skal halda.

Í byrjanarstøðu útinnur grannskoðarin sínar uppgávur í sambandi við grannkoðanina av ársrokskapinum. Vavið av grannskoðanini veldst um ítøkiligu umstøðurnar undir hesum serliga stødd á grunni, grunsins fíggjarligu støðu og vavið á virkseminum.

Grannskoðarans eftiransan broytir ikki upp á, at nevndin skal hava rímiliga tíð til at føra nevndu skjøl, og at t.d. gerðabøkur frá nevndarfundum verða undirskrivaðar á næsta nevndarfundi av teimum nevndarlimum, sum vóru til staðar á tí fundinum.

Staðfestir grannskoðarin, at nevndin ikki hevur hildið sínar skyldur, skal grannskoðarin gera eitt serligt úttalilsi um tað, sum skal sendast grunnamyndugleikanum. Grunnamyndugleikin verður á henda hátt kunnaður um, at nevndin ikki heldur krøvini í lóggávuni um at føra skjøl og bøkur o.a. Roknast má við, at áðrenn grannskoðarin ger eitt slíkt úttalilsi, og letur tað inn til grunnamyndugleikan, at hann hevur givið nevndini høvi til at halda skyldurnar.

Grannskoðarans úttalilsi skal ikki almennakunngerast í KT- skipan Skráseting Føroya.

Endamálið við grannskoðarans eftiransan er at styrkja at krøvini í lógini, sum skulu tryggja kunnleikan um týðandi viðurskifti í grunninum og tryggja staðfesting av ábyrgd og atlit til nevndarlimir. Reglan skal sostatt viðvirka til fullgóða umstiting.

Til nr. 3

Eftir § 29, stk. 1 í galdandi vinnugrunnalóg skulu tilnevnast ein ella fleiri grannkoðarar at grannskoða ársoknskap grunsins. Nevndin fyri grunnin tilnevnir grannskoðarar ella teir verða verða tilnevndir av tí, sum sambært viðtøkunum kann tilnevna.

Er eingin grannskoðari tilnevndur, tilnevnir grunnamyndugleikin ein ella fleiri grannskoðarar.

Sambært § 23 í grannskoðaralógini skal grannskoðanarfyritøka, ið grannskoðar PIE- fyritøkur tryggja, at tann ella teir grannskoðarar, ið undirskriva grannskoðanarátekningina, í seinasta lagi 7 ár eftir, at teir eru tilnevndir at gera uppgávuna, verða skiftir út fyri eitt tíðarskeið, sum er í minsta lagi 2 ár. Grannskoðanaruppgávan kann tó verða latin einum øðrum grannskoðara í somu grannskoðanarfyritøku.

Eftir artikkul 17, stk. 1, í nýggju PIE-fyriskipanini, sum skotið verður upp at seta í gildi í Føroyum, sbr. uppskot til løgtingslóg um at seta í gildi PIE-fyriskipanina, kann longdin av grannskoðarans grannskoðanaruppgávu ikki fara upp um 10 ár í mesta lagi. Eftir artikkul 17, stk. 4, í fyriskipanini er tó móguligt nationalt at loyva at tíðarskeiðið kann vera upp til 20 ár,

um grannskoðanaruppgávan er boðin út, og upp til 24 ár, um meira enn ein grannskoðari verður valdur.

Í § 1, nr. 46, í uppskotinum til løgtingslóg um broyting í grannskoðaralógini verður skotið upp, at § 23 í galdandi grannskoðaralóg verður umorðað.

Sum avleiðing av umorðingini av av § 23 í grannskoðaralógini, og fyri at nýta møguleikarnar í PIE- fyriskipanini at leingja valtíðarskeiðið fyri sama grannskoðara, verður skotið upp í § 2, nr. 3, í uppskotinum at seta nýggja § 29 a í vinnugrunnalógina. Skotið verður upp, at ein grunnur fevndur av vinnugrunnalógini, sum eftir grannskoðaralógini er allýstur sum ein PIE-fyritøka, kann leingja valskeiðið upp til 20 ár, um grannskoðanaruppgávan hevur verið í útboði, og upp til 24 ár, um meira enn ein grannskoðari verður valdur.

Víst verður til viðmerkingarnar til § 1, nr. 5.

Til § 4
Skotið verður upp, at løgtingslógin kemur í gildi 1. juli 2021

Í stk. 2 verður skotið upp, at forboðið fyri avtalum sum avmarka vali av einum ella fleri grannskoðarum og teirra varafólkum, sum skulu tilnevnast at grannskoða ársroknskapin hjá einum felagi ella einari fyritøku, verður nýtt fyrstu ferð grannskoðarin skal tilnevnast eftir at lógin er komin í gildi.

Grannskoðarar, sum eru valdir eftir avtalutreytum um avmarkingar í valinum av einum ella fleri grannskoðarum, kunnu sostatt halda fram í starvinum verandi tíðarskeiðið, teir eru valdir fyri.

Avtalur um avmarkingar í valinum av einum ella fleiri grannskoðarum og teirra varafólkum varðveita eftir uppskotinum teirra gildi til dagsetingina av fyrsta valinum eftir gildiskomu lógarinnar av einum ella fleri grannskoðrum og teirra varafólkum. Við hesum verður tryggjað, at ivi ikki verður um gildi av váttanum o.a. frá grannskoðarum, sum eru tilnevndir eftir avtalutreytum, sum avmarka valið av grannskoðara.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 2. mars 2021

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

Fylgiskjøl
Fylgiskjal 1: Hoyringarnotat
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Felagnum Føroyskir Grannskoðarar
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Januar, løggilt grannskoðanarvirki
Fylgiskjal 4: Hoyringarsvar frá NUMO, løggilt grannskoðanarvirki
Fylgiskjal 5: Hoyringarsvar frá SPEKT, løggilt grannskoðanarvirki
Fylgiskjal 6: Hoyringarsvar frá Grannskoðaraeftirlitinum
Fylgiskjal 7: Hoyringarsvar frá Tryggingareftirlitinum
Fylgiskjal 8: Hoyringarsvar frá Eftirlønargrunni FA´s

Fylgiskjal 9: Hoyringarsvar frá Føroya Arbeiðsgevarafelag
Fylgiskjal 10: Hoyringarsvar frá Betri Trygging og Betri Pensjón
Fylgiskjal 11: Javntekstur